Barna- og útbúgvingarmálaráðið (BUMR)
J.H. Schrøtersgøta 7, Postboks 3279
110 Tórshavn

Dato: 27. Oktober 2023
23/21157

Sent við telduposti til: *bumr@bumr.fo*

Viðv.: Hoyringsskriv – uppskot til Løgtingslóg um Kervi+

Yrkisdepilin hevur tann 10. oktober 2023 fingið sendandi uppskot til løgtingslóg um Kervi+ (mál 23/03209) til hoyringar frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

Umboðandi Yrkisútbúgvingarráðið og Yrkisnevndina skal innleiðandi takkast fyri møguleikan at gera viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um Kervi+. Viðmerkingarnar eru royndar hildnar innanfyri tað sum hugsast kann vera serliga viðkomandi fyri Yrkisdepilin umboðandi Yrkisútbúgvingarráðið og Yrkisnevndina.

Yvirskipað eru høvuðsendamálini við lógaruppskotinum og skipanini Kervi+, at hjálpa skúlum og stovnum at skipa virksemi og tilfeingi umframt at veita eina KT-skipan, ið er trygg at brúka og skal tryggja, at persónupplýsingar eru væl vardir og sum ikki kunnu koma óviðkomandi í hendi. Hesum endamálum verður tikið fult undir við.

Út frá hesum endamálum og uppskotinum annars sær lógaruppskotið út til at vera serliga viðkomandi fyri skúlar og stovnar, har Kervi+ kemur at avloysa ymsar verandi skipanir hjá hesum skúlum og stovnum, har hesi í hvør í sínum lagi, sum brúkarar av Kervi+, koma at virka sum dátuábyrgdarar tá upplýsingar úr Kervi+ vera brúktar til teirra egnu endamál, við Undirvísingarstýrinum sum dátuviðgera fyri hesar einstøku skúlar og stovnar.

Hóast Yrkisdepilin í viðmerkingum til lógaruppskotið verður nevndur sum ein av fleiri møguligum brúkarum av Kervi+ skipanini, og harvið sambært § 3, stk. 2 í uppskotinum gerst dátuábyrgdari, tá nýtslan av upplýsingum er til egin endamál, við Undirvísingarstýrinum sum dátuviðgera, so er talan altso ikki um, at Kervi+ skal avloysa nakra skipan sum Yrkisdepilin í dag umsitur, undir hesum skipanir sum Yrkisdepilin umsitur vegna virksemi hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og Yrkisnevndini.

Heitt verður á BUMR um at vátta, at lógaruppskotið er rætt skilt hesum viðvíkjandi. Um omanfyristandandi ikki er rætt skilt, verður heitt á BUMR um skrivliga at koma við eini rættleiðing hesum viðvíkjandi, undir hesum skrivliga at nágreina nærri, hvørjar skipanir talan í so fall kann vera um.

Hoydalsvegur 1
FO-100 Tórshavn
+298 30 65 60
yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo
yrkisdepilin.fo

Yrkisdepilin umboðandi Yrkisútbúgvingarráðið og Yrkisnevndina ynskir við hesum somuleiðis staðfest, at heimildir, sum í dag liggja hjá Yrkisdeplinum, við lógaruppskotinum ikki leggjast yvir í Undirvísingarstýrið. Harumframt ynskist staðfest, at Yrkisdepilin við lógaruppskotinum ikki verður undirlagdur leiðbeiningum, fyriskipanum, boðum ella líknandi frá Undirvísingarstýrinum. Heitt verður á BUMR um at vátta, at so er.

Hóast omanfyristandandi viðmerkingar so ynskist upplýst, um tað við Kervi+ skipanin er ein møguleiki hjá Yrkisdepilinum sjálvboði at knýta egnar skipanir í Kervi+, um ynski skuldi verið um tað. Tað kann eitt nú vera skipanir til umsiting av ymsum viðurskiftum viðvíkjandi lærlingum, undir hesum sáttmálum, læruplássum, prógvum, avgerðum hjá m.a. Yrkisnevndini, fyrisitingarligum avgerðum, kærumálum í Kærunevndini og Sáttmálanevndini vm.

Um hetta er ein møguleiki hjá Yrkisdeplinum, ynskist somuleiðis upplýst, hvussu viðgerðin av upplýsingum um lærlingar á føroyskum læruplássum, men sum taka sína kravdu skúlagongd á stovnum í Danmark, kann fara fram og gerast partur av Kervi+ skipanini. Er Kervi+ ikki ætlað til viðgerð av tílíkum upplýsingum og viðurskiftum um lærlingar, ynskist hetta somuleiðis upplýst av BUMR.

Fyribils eru ikki fleiri viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um Kervi+. Um spurningar ella ivamál eru til viðmerkingarnar omanfyri eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við undirritaðu.

Vegna Yrkisútbúgvingarráðið og Yrkisnevndina

Randi Frederiksberg

Leiðari / Manager